lesarabrøv

Hvar er Príseftirlitið??

Prísmunurin á eini sterkari øl, gull t.d., er heilt ræðuliga stórur, frá einum ølklubbi til annan. Hvat hava vit príseftirlit til, tá sovorðið kann ganga? Og bert heldur á?

Onkur selir eina øl fyri 17,- kr. Meðan aðrir ølklubbar liggja uppi á heilum 23,- kr. Hvat er hetta fyri nakað? Er hatta ikki brandólógligt? Er hatta ikki ólógligt okur?

Viðv. vørum annars, serliga matvøruprísunum, hava teir í nógv ár verið heldur støðugir, og ikki so ræðuliga høgir, tað ger kappingin. Nógvir keypmenn hava noyðst at givist, síðani stórhandlarnir (»supermarkets«), komu, og tað er ein viss kapping.

Men viðv. tilboðum/útsølum er tað reiðiliga komin inflatión í hesi bæði fyribrigdi. Tá ið handil/handlar altið, ella næstan altíð hava tilboð, so hendir tað, at tann (sonevndi) reelli kostprísurin fyri eina vøru, (= kostnaður frá heilsølu uttan- ella innanlands, + flutningsgjald, + toll, + ágóða, (»avansu«), tann veruligi, rímiligi prísurin, vøran skuldi havt, undir vanligum viðurskiftum, verður so ringur at vita, hjá tí skundmiklu, útiarbeiðandi húsmóðurini, el.ø., at prísmedvitið verður nakað kámað av tilboðunum.

Hendir tað so ein dag, at tað er onki tilboð á nakrari vøru, prísirnir veruligir, tá stúrsar ein við: Er tað so dýrt? Í dag? Eitt, ið eisini ger seg galdandi, er tað, at tað eru so ógvuliga nógvir vørubólkar, har prísirnir broytast, svinga so ofta, so tað ger tað trupult at varðveita sítt rationella prísmedvit.

Men eitt líkist ongum, og tað er, at ein og sama vøra, ella næstan akkurát hin sama vøran, er innpakkað í ymiskan innpakning. T.d. kunna tað vera 5 »sløg« av vørum, á 5 handilshillum. Men, í veruleikan eru tað bert tvær, ella bert ein vøra. Men av órættum, bert fyri at villleiða fólk, eru tær pakkaðir inn í 5 ymisk sløg av pakningi. Tað tykist viðhvørt at vera gjørt meira burtur úr pakninginum, enn sjálvari vøruni. og, so kunna tað t.d. standa 5 ymisk virki, fyri at gera hesi 5 vøru sløgini, eitt virki fyri hvørja vøruna, meðan tað í veruleikanum bert er eitt og tað sama virkið, ið er hin veruligi framleiðarin, alt bert fyri at geva fólki fatan av (fiktivari!!) kapping. Prísmunirnir tá eru púra fiktivir/villleiðandi, fyri at hála størri vinning burtur úr lummum keypara, ið verður villleiddur.

»Nýthavin (»konsumenturin), er kongur«, hevur onkur sagt. Men tá má hann eisini hava valmøguleikar.

Nei, skálkurin eitur Hitt Almenna, ið tekur alt ov stóran skatt frá meiniga manninum. Tí eigur Landsstýrið at tryggja keypiorkuna av einari reallønarframgongd. Tí, um verkafjøldin, við bit og slit, fær vunnið sær einar 8, ella 11 kr., afturat, upp á verandi tímalønir, (tey lægstløntu tó væl meira!!! men, best sum henda nýggja, hækkaða tímalønin er farin at virka, at **Landsstýrið** tá kemur og stjelur ella krevur eini 80%, ella 90%, av real lønarhækkingini, inn aftur, í tollum og skattum, tá er onki vunnið, tvørtur í móti, tí, um tað ikki kemur prísstøðgur og skattalækki samstundis við real- og total lønarhækkingini, og váttað trygd fyri fullari keypiorku, so verður ongin veruligur bati í korum verkafjøldarinnar.

Nú gjørdist hetta heldur langt, men, fyri at nevna tað fyrsta aftur seinast: Hasin ræðuliga prismunurin, á sterkum øli, í ølklubbunum, **hann** hoyrir onga staðni heima, hvar er **prisansarin??**

MP.


Troling á landleiðini

Í sambandi við tað misljóð, sum er komið í ímillum formannin í fiskivinnunevndini hjá Føroya Løgtingi og ein meiriluta uppá tvørs av samgonguni, har partar av landsstýrinum eru við, er bert fyri mítt viðkomandi at siga, at eg taki fult undir við tí støðu, sum Henrik Old hevur tikið í hesum álvarsmáli. Tað at lata upp aftur fyri troling runt Suðuroy á økjum, sum eru til gýtingarstovn okkara, tað er ørskapur.

Økini við Suðuroy hava eina tíð verið friðað fyri troling, og tí hava teir vanligu útróðrarbátarnir verið tryggjaðir.

Húkaveiða er ikki oyðandi veiða, tað veit ein og hvør føroyingur. Er tað so, at Fiskivinnustovan er við í hesum tilmæli, sum her er samtykt, so verður spurningurin, um vit í heila tikið hava brúk fyri eini fiskivinnustovu.

Tí einum nýtist ikki at vera fiskifrøðingur fyri at duga at skilja, at troling inn at klettinum, tað ikki bara oyðir fiskastovnin, men sum Bjarni Vestergård segði frá í útvarpinum, tað oyðileggur botnin, soleiis at tað gangur nógv ár, áðrenn fiskur kemur aftur á hesar leiðir.



Tað, at tað verður sagt at nú eru meskarnar so stórar, at bæði yngul og smáfiskur verður sílað ígjøgnum, hvat er tað fyri yngul ella smáfiskur, sum verður sílaður ígjøgnum trolini, tað er deyður yngul og deyður smáfiskur.

Út frá at skaðin er hendir fyri hesaferð, má verandi samgonga gera sær greitt, at hon má taka henda spurningin upp til álvarsliga viðgerð, so at vit seta eitt mark fyri hvat er loyvt, og at tað er rann politikkur, sum er skrásettur í samgonguskjalinum sum verður framdur, ikki tilráðingar uppá tvørs av tí, sum samgongan er samd um. Vit skulu føra ein politikk, sum skal vera til gagns fyri okkara samfelag, ein politikk, sum skal menna fiskastovnarnar við Føroyar. Tað gera vit ikki við at taka tilvildarligar lættisoppa avgerðir. Verandi samgonga eigur at standa fast við tað, sum er til gagns fyri heildina, vit hava tikið ópopulerar avgerðir, og vit koma at taka fleiri, men er tað til gagns í seinna enda, so er at standa við. Avgerðin um at loyva troling á landleiðini við Suðuroy er ein skeiv avgerð, sum verður at taka upp í samgonguni, og er tað so, at henda tilráðing er viðmælt av fiskivinnustovuni, so eiga hesi viðurskifti at verða viðgjørd í tí álvarsemi, sum nú fiskivinnan og fiskivinnustovnurin undir Føroyum sum heild eigur at verða viðgjørdur.

Tað skal standa fast, at eg fyri mítt viðkomandi taki fult undir við tí støðu, sum formaðurin í fiskivinnunevndini tók: troling á landleiðini vestan fyri Suðuroy er ørskapur. Støðan hjá Henrik Old formanni í fiskivinnunevndini er tann beina og hon fær mín fulla stuðul.

Sverre Midjord

Grunnurin til frama fyri samstarvi og fatan millum Nuuk og Tórshavn

Høvi er nú aftur til at søkja um fíggjarligan styrk úr felags grunninum, sum býráðini í Nuuk og Tórshavn hava sett pening í, hvørs endamál er at stuðla tiltøk og starvsemi, ið kunnu menna fatanina millum kommununar báðar og borgarar teirra.

Ætlanin er nú í juli/august mánað at tak avgerð um veitan at studningi.

Býráðið heitir tí við hesum á einstaklingar og feløg, ið halda seg koma undir fyritreytirnar fyri studningi, um at senda býráðnum skrivliga umsókn við frágreiðing um tiltakið ella starvsemið, nær tað verður fram og metta kostnaðin av tí.

Fyri at verða viðgjørd í juli/august eigur umsókn merkt Nuuk-Tórshavn at vera býráðnum í hendi í seinasta lagi 3. juni 1991.

Tórshavnar Býráð



JOB
I HELE VERDEN

Nu er den her! Inbundet bog på 170 sider. Som aldrig har været udgivet før.
Med nyindhentet, frisk og aktuel information. Al tekst er på svensk.
Bogen indeholder alt fra ansøgning til ansættelsesformular. Alt om uddannelsesmuligheder, klima, boligforhold, evt. stipendier, forsikringer, lønninger, rejseudgifter, arbejds- og opholdstilladelse lægeattester, ansættelsestidspunkter.
Her er et uddrag af vor indholdsfortegnelse: Au pair, Kibbutzer, Entreprenørvirksomheder, Ingeniører, Bærplukkere, Landbrugsmedhjælpere, Hotel- & restaurationsbranchen, Minedrift, Sygepleje, Undervisningssektoren, Rejsebranchen, Mannequin og modeller, Luksuskrydstogter, Olieboring, Chauffører, Instruktører, Skilærere, Hvordan man rejser billigt m.m.
Desuden får du adresser på ca. 1.000 virksomheder og arbejdsformidlinger.
Køb bogen for kun 154 SEK inkl. fragt og postopkrævning.
Bestil i dag, skriv til:

LOUVI AB
Box 48
Skogåstorget 2
S-142 01 TRÅNGSUND
SWEDEN

V4-tølini

í drátti nr. 890, 11. mai 1991

Tølini: 83 — 69 — 70 — 32 — 73 — 04 — 60 — 48 — 54 — 30 — 13 — 27 — 86 — 84 — 68 — 03.

Vinningur: 134.285,00 kr.

Vinnarar: Fýra, ein av Vatnsoyrum, ein úr Leirvík, ein úr Trongisvági og ein úr Havn.

Eykavinningur: 25.000,00 kr. Ein uppá 10.000 krónur, fimm uppá 1.000 kr. og 20 uppá 500 kr.

Bíligur bilur

Fiat Uno, 5 hurðar, koyrt 47.000, sera økonomiskur og í góðum standi. Nýsýnaður og umafturlakeraður (silvurgráur) — fyri bert 25.000,- kr.

Tlf. 14368

Lýsið í **sosialinum**